# Atlantic má ansað eftir bilunum

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av eystri og regn. Um kvøldið hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av norði og kavaælingur, men um kvøldið minni vindur av útnyrðingi og yvirhøvur turt. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrst lot av norði ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin um 1 stig. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og regn. Lýggjari.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og útnyrðingi og ælingur, sum fráliður kavi. Hitin fellur niður um frostmarkið.

Skeltið á myndini er helst ikki millum mest vanligu ferðsluskeltini, sum eru at síggja. Í øllum førum mundu útsendu blað- og myndamenninir undrast eitt sindur, tá vit á Oyggjaleikunum í summar komu fram á skeltið.

Boðini er stutt og greitt, at bilar mugu ansa eftir flogførum, tá koyrt verður fram við hesum lítla vegastrekkinum í Sumburgh í Hetlandi. Tangin, har flogvøllurin er lagdur, er snøgt sagt somikið smalur, at tað valla er meira enn einir tveir metrar millum koyrivegin, sum vanliga bilferðslan nýtir, og so sjálvan flogvøllin. Og tí er vandi fyri, at flogførini ikki eru meira enn nakrar fáar føtur yvir vegnum, tá tey flúgva framvið.

Vit vita tó ikki enn, hvørt flogskipararnir hjá Atlantic Airways hava fingið nakra serstaka ávaring um at ansa bilunum, tá teir í summar fara at flúgva til Sumburgh. Men nú er ávaringin í øllum førum givin víðari.

**-mørk**




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 15 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 18 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 972 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðing eystan og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1010 hPa. yvir Atlantshavinum fer móti Skotlandi og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer í landnyrðing og gevur nógvan høgættavind á okkara leiðum leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 8/11 kl. 06[00]– 9/11. 06[00]. Hitin í gjár: 6,6°
Minsti hiti máldur í nov.: - 7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,9 mm – mált frá 08/11 kl. 06[00]– 09/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 31,9 mm

Hygg her...



Keeway Focus
12.900,- ella 600,- /mðr
íroknað hjálm!
1 ára garanti

Peugeot Vivacity
13.900,- ella 600,- /mðr
íroknað hjálm!
3 ára garanti

Peugeot Speedfight
19.900,- ella 800,- /mðr
- íroknað hjálm og drakt!
3 ára garanti

TEAM85

PM Føroyar
Jansstovugøta 10
Tórshavn
Tel 312400
www.peugeotscooter.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

9. november Fyrra kvarter
10. november Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. Nov. | 01.15 | 13.51 | 00.15 | 12.51 | 00.30 | 13.06 | 03.15 | 15.51 | 04.15 | 16.51 | - | 12.06 | 11.06 | 23.42 | 01.30 | 14.06 | 02.30 | 15.06 | 01.00 | 13.36 | 02.15 | 14.51 |
| 11. Nov. | 02.27 | 14.50 | 01.27 | 13.50 | 01.42 | 14.05 | 04.27 | 16.50 | 05.27 | 17.50 | 00.42 | 13.05 | - | 12.05 | 02.42 | 15.05 | 03.42 | 16.05 | 02.12 | 14.35 | 03.27 | 15.50 |
| 12. Nov. | 03.13 | 15.35 | 02.13 | 14.35 | 02.28 | 14.50 | 05.13 | 17.35 | 06.13 | 18.35 | 01.28 | 13.50 | 00.28 | 12.50 | 03.28 | 15.50 | 04.28 | 16.50 | 02.58 | 15.20 | 04.13 | 16.35 |
| 13. Nov. | 03.58 | 16.21 | 02.58 | 15.21 | 03.13 | 15.36 | 05.58 | 18.21 | 06.58 | 19.21 | 02.13 | 14.36 | 01.13 | 13.36 | 04.13 | 16.36 | 05.13 | 17.36 | 03.43 | 16.06 | 04.58 | 17.21 |
| 14. Nov. | 04.44 | 16.44 | 03.44 | 15.44 | 03.59 | 15.59 | 06.44 | 18.44 | 07.44 | 19.44 | 02.59 | 14.59 | 01.59 | 13.59 | 04.59 | 16.59 | 05.59 | 17.59 | 04.29 | 16.29 | 05.44 | 17.44 |

5 707265 100043 >